Íbúgvar í Sandoyar valdømi

Vit takka tykkum hervið fyri tann dygga stuðul, tit veittu til løgtingsvalið 30. apríl. Við tykkara hjálp fingu vit mannin inn á ting.

Samstundis vilja vit ynskja manningini úti í Tinganesi góðan byrð á tí kós, sum er sett út.

Vinarliga,
Sandoyar Tjóðveldisfelag

Stuðul til frítíðaruppihald í Danmark fyri rørslutarnað

Møguligt er nú hjá rørslutarnaðum í Føroyum og familjum teirra at søkja um stuðul til at fáa eitt ókeypis uppihald á frítíðarmiðstøðini "Musholm Bugt Feriecenter", sum liggur tætt við Korsør í Danmark.

"Musholm Bugt Feriecenter" verður mett at verða eitt av verðins bestu frítíðarmiðstøðum fyri rørslutarnað. Bæði innandura og uttandura er miðstøðin innrættað til koyristólabrúkarar, og tað er ríkiligt av plássi til at koyra runt allastaðni í miðstøðini. Miðstøðin liggur beint við strondina í vøkrum náttúruumhvørvi. Møguleiki er fyri at íðka ymisk frítíðarítriv.

Møguleiki er fyri at søkja um stuðul til ókeypis frítíðaruppihald á "Musholm Bugt Feriecenter", og ískoyti til ferðaútreiðslur. Tað er ikki møguligt at søkja beinleiðis um fíggjarligan stuðul í reiðum peningi.

Tá ið støða verður tikin til, hvør skal fáa stuðul til frítíðaruppihald, verður dentur lagdur á brekið hjá umsøkjaranum, tørvin til at koma uttanlands og fíggjarligu umstøðurnar hjá umsøkjaranum og/ella familjuni. Upplýsast skal eisini hvussu nógvir familjulimir o.o., umframt umsøkjaran, søkt verður stuðul til. Tað er ein fyrimunur, um talan er um eina barnafamilju.

Samlaða upphæddin til at geva út fyri 1998 er í alt 250.000,00 kr. og er innkomin við yvirskotið frá "Muskelsvindfondens Skrabespil" og stuðli frá Føroya Banka, Smyril Line og Atlantic Airways.

Umsóknir kunnu sendast til Almanna- og heilsumálastýrið, Tinganes, Postboks 64, FO-110 Tórshavn.

Umsóknarfreistin er 3 vikur frá lýsingardato. Umsóknirnar verða viðgjørdar í tann mun, ið tær verða móttiknar.

Arbeitt verður við stuðli frá:

Atlantic Airways · FØROYA BANKI · SMYRIL LINE · Muskelsvindfondens Skrabespil

Skráseting Føroya
hevur í dag skrásett niðanfyri standandi partafelag:

Skrásetingar-nr.
P/F 2697

Navn: P/F Telefonverkið

Hjánøvn:
P/F Atlantic Carrier (P/F Telefonverkið), P/F Atlantic Telecom (P/F Telefonverkið), P/F Atlantic Telecom International (P/F Telefonverkið), P/F Atlantic Telecom Mobile (P/F Telefonverkið), P/F Atlantic Telecommunications (P/F Telefonverkið), P/F Faroese Carrier (P/F Telefonverkið), P/F Faroese Connection (P/F Telefonverkið), P/F Faroese Internet (P/F Telefonverkið), P/F Faroese Link (P/F Telefonverkið), P/F Faroese Telecom (P/F Telefonverkið), P/F Faroese Telecom International (P/F Telefonverkið), P/F Faroese Telecom Mobile (P/F Telefonverkið), P/F FaroeTel (P/F Telefonverkið), P/F FarTel (P/F Telefonverkið), P/F Fjarskiftistænastan (P/F Telefonverkið), P/F FT (P/F Telefonverkið), P/F Føroya Fartelefoni (P/F Telefonverkið), P/F Føroya Fjarskifti (P/F Telefonverkið), P/F Føroya Fjarskiftistænasta (P/F Telefonverkið), P/F Føroya Internet (P/F Telefonverkið), P/F Føroya Kaðal Sjónvarp (P/F Telefonverkið), P/F Føroya Tele (P/F Telefonverkið), P/F North Atlantic Carrier (P/F Telefonverkið), P/F North Atlantic Telecom (P/F Telefonverkið), P/F North Atlantic Telecom International (P/F Telefonverkið), P/F North Atlantic Telecommunications (P/F Telefonverkið), P/F Tele Føroyar (P/F Telefonverkið), P/F Telebúðin (P/F Telefonverkið), P/F Telefonverk Føroya Løgtings (P/F Telefonverkið), P/F Teleshop (P/F Telefonverkið), P/F TFL (P/F Telefonverkið), P/F Tænastumiðstøðin (P/F Telefonverkið).

Adressa:
Postbox 27, 110 Tórshavn.

Kommuna:
Tórshavnar Kommuna

Stovningardato:
29.04.1998

Viðtøkudato:
29.04.1998

Kapitalur:
Kr. 60.000.000,00

Inngjaldingarháttur:
Kr. 60.000.000,00 í øðrum virðum til kurs 129,91.

Stovnari:
Vinnumálastyrið, Tinganes, 100 Tórshavn.

Nevnd:
Jógvan E. Ellefsen, Onnugøta 20, 188 Hoyvík (formaður), Tór Ari Johanneson, 340 Kvívík (næstformaður) og Bergtór Halldórsson, Lækjarhvammur 7, 220 Hafnarfjørður, Ísland.

Stjórn:
Andras Róin, Undir Svartafossi 5, 100 Tórshavn.

Tekningarreglur:
Felagið verður teknað av stjóra saman við nevndarformanni ella næstformanni ella av formanni saman við tveimum nevndarlimum.

Grannskoðari:
Suni Schwartz Jacobsen, løggildur grannskoðari, P/F KPMG, Pauli Ellefsen, Staravegur 17, 100 Tórshavn.

Roknskaparár:
01.01. - 31.12.

Fyrsta roknskaparár:
01.01.1998 - 31.12.1998

Endamál:
Endamál felagsins er at hava í hondum og reka fjarskiftiskervi og fjarskiftistænastu umframt aðra vinnu, sum hevur samband við hetta virksemi.

Skráseting Føroya
tann 18. mai 1998

Kristin Balle

Skráseting Føroya
hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr.
Sp/f 2728

Navn:
Sp/f Faroe Construction

Adressa:
Vørðslan 10, 100 Tórshavn

Kommuna:
Tórshavnar Kommuna

Stovningardato:
24.04.1998

Viðtøkudato:
24.04.1998

Kapitalur:
Kr. 80.000,00

Inngjaldingarháttur:
Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.

Stovnarar:
Asbjørn Müller, 900 Vágur, Kári Johansen, Vørðslan 10, 100 Tórshavn, Eyðun Holm, 900 Vágur, Johan Sofus Müller, 900 Vágur og Alfred Wøldige, 900 Vágur.

Stjórn:
Kári Johansen, Vørðslan 10, 100 Tórshavn og Eyðun Holm, 900 Vágur.

Tekningarreglur:
Felagið verður bundið av einum stjóra.

Grannskoðari:
Sp/f Grannskoðarafelagið Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.

Roknskaparár:
01.01. - 31.12.

Fyrsta roknskaparár:
24.04.1998 - 31.12.1998

Endamál:
Endamál felagsins er at reka handil og ídnað.

Skráseting Føroya
tann 15. mai 1998

Kristin Balle

Í sambandi við partvísu umbyggingina av Sjónleikarhúsinum, verður skemtileikurin "Brim og Brúdleyp" framførdur
mikud. 20. mai kl. 18.00.

Philip King & Falkland L. Cary:

Brim og Brúdleyp

Sjónleikur í trimum portum

Tekning: "Gamla" leikhúsið

Sýningar verða:
Mikud. 20/5 kl. 18.00
Hósd. 21/5 kl. 18.00
Leygard. 23/5 kl. 18.00
Sunnud. 24/5 kl. 18.00
Týsd. 26/5 kl. 19.30
Mikud. 27/5 kl. 19.30
Hósd. 28/5 kl. 19.30

Sosialurin 31 18 20

Frá
Stokkastovuni í Runavík

Pizzakøkurin er opin hvønn dag

Minnist til dagsins rætt og A la carte matseðilin!

Vit skipa eisini fyri stórum sum smáum veitslum.

Stokkastovan,
Tlf. 48850

Ringið!
– og vit skriva
11820